

# Øgiliga lítil og valds



## St. Brendan og Tróndur fingu meg higar

Á longu ferðum sínum einsamallur í bátinum, er tað meiri enn so, at ein løta stingur seg upp har lítið og onki er at gera. Tá er tað, at Patrick Reilly plagar at lesa og blaða í ymsum bøkrum.

Í Írlandi las hann bókina Brendans rejse, ella the Brendan Voyage, sum uppruna heitið er. Fyri nógvar føroyingar er hendan bókin kend, og tey allarflestu hava helst hoyrt eitt sindur um hesa ferð, sum ævintýrarin Tim Severin stóð á odda fyri.

Á ferðini úr Írlandi til Newfoundland eru fimm mans við. Ein teirra er Tróndur Pætursson og á leiðini vestur um hav koma teir framvið Føroyum. – Eg haldi menninar vera ørar at sigla í einum slíkum báti, men frásagnin er fantastiska spennandi, og er hon beinleiðis orsøkin til, at eg valdi at koma til Føroya, smílist Patrick Reilly. – Tá teir kunnu higar í einum tílíkum báti, so kann eg eisini sigla her til í mínum báti hugsaði eg, sigur hann.

Patrick Reilly greiðir eisini frá, at hann ómetaliga gjarna kundi hugsa sær at vitja í Kirkjubø, síggja Brendansvík og staðið har írsku munkarnir hava búleikast av fyrstan tíð.

– Eg verið í Føroyum nakrar dagar aftrat og ætli mær heilt sikkurt at vitja har, sigur Patrick Reilly, sum vónar at renna seg inn í Trónd har og kanska fáa eitt lítið prát við hann.

**Patrick Reilley er ein ævintýrari burturav. Onkur vil kanska kalla hann øran. Hann hevur einsamallur siglt úr Maine í USA til Írlands og úr Írlandi til Íslands, í einum báti, sum ikki er meiri enn 7,5 metrar langur og sum ongan motor hevur**

ÆVINTÝRARI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Patrick Reilly er frá Maine í USA. Hann er 32 ára gamal og seinastu fýra árini hevur hann siglt tvørtur um Atlantshavið fleiri ferðir í sínum 7,5 metra langa báti.

Tá eg hitti ævintýraran í báti hansara var mín fyrsti spurningur, um hann ikki hevði nakran motor umborð. Hann flennir, ristir við høvdinum og sigur við síni eyðkendu amrikansku úttalu: – Nei, eg sigli bara við seglum.

Patrick Reilly byrjaði ferð sína fyri smáum fýra árum síðani. Tá sigldi hann úr Maine, sum er beint sunnan fyri Newfoundland til Caribien, har hann síðani arbeiddi hálvtannað ár. – Áðrenn hevði eg arbeitt við bátar og siglt í nógv ár, og tað var eisini tað, eg gjørdi í Caribien, fortelur vælvaksni og dámligi amerikumaðurin. Tá vit spyrja nærri til hvat hann sigldi í Caribien, sigur Patrick Reilly, at tað oftani vóru ríkfólk, sum vildu hava hann at sigla yacht sína fyri seg, men at hann eisini sigldi styttri túrar og vísti fólki runt.

### Miðamerika – Evropa tur/retur

Úr Carribien gekk leiðin eystur um hav til Azorurnar. – Eg hevði upprunaliga ætlað mær til Frankaríki á ein bátafestival. Men staddur miðskeiðis í Atlantshavinum mátti eg ásanna, at eg neyvan fór at koma til Frankaríki til tíðina, og so legði eg leiðina um og setti kós móti Azorunum, greiðir Patrick Reilly frá.

Túrurin eystur um hav tók honum ein lítlan mánað, og tað er rættiliga skjótt, havandi í huga hvussu langt tað er í millum heimspartarnar báðar.

Úr Azorunum gekk leiðin til Írlands og tók tann túrurin eina viku.

Komin til Írlands legði Patrick Reilly lítla bátin hjá sær fyri veturin, og fór hann at ferðast til Kroatia. Har møtti hann einum ríkum pari, sum átti ein flottan bát fyri nógvar milliónur krónur.

– Tey ætlaðu sær til Caribien og tá tey frættu, at eg longu hevði siglt túrurin tvørtur um Atlantshavið einaferð, spurdu tey meg, um eg ikki kundi føra tey og bátin vestur um til Caribien, greiðir Patrick Reilly frá. Hann tók av tilboðnum og sum hann sjálvur sigur, so var tað ikki tað sama at sigla tvørtur um Atlantshavið í einum báti, sum ikki er meiri enn 23 føtur, og so einum marglætisbáti fyri fleiri milliónir.

– Ja, hetta var annað lív enn at sigla mín lítla bát, og so fekk eg løn fyri tað eisini. Tað var herligt, flennir Patrick, sum hevur bátin og havið sum sítt arbeiðspláss, samstundis sum tað eisini eru støðini, har, hann brúkar sína frítíð.

Í Caribien arbeiddi hann aftur í eina tíð og seinni var hann aftur og vitjaði heima í Maine, áðrenn hann fleyg aftur til Írlands og til Grace, sum bátur hansara eitur.

– Mær dámar ógvuliga væl at ferðast til støð, har eg ikki havi verið áður, sigur Patrick. Úr Íslandi gekk leiðin til Føroya og síðani mikudagin í farnu viku, hevur Patrick Reilly verið her á klettunum.

### Fáa illa vent okkum

Tá Patrick bjóðar okkum umborð á bát sín seinnapartin í gjár, týsdagin, takka vit sjálvandi fyri og stíga umborð. Framman undan hevði Patrick fortalt, at báturin var 23 føtur langur, men nú vit standa umborð tykist báturin lítið størri og lítið tryggari enn nakar tunnuflaki, sum mann onkuntíð hevur bygt.

– Hygg, kom niður undir, sigur Patrick, og hoppar niður gjøgnum lítla leytaran. Myndamaðurin fer í hølunum á honum, og eg ætli mær at leypa aftaná. Men so er tað at eg má ásanna, at um eg eisini hoppi niður í lugari, so er tað bæði sikkurt og vist, at vit sita rimmar fastir allir sum ein og neyvan sleppa